ini ein partur av innslagnum til sendingina kl. 12:20.

- Og so er bara veðrið eftir, sigur Jógvan fegin á málinum.

### Fløgan klár

Høvuðstíðindini eru har, hóast samrøðurnar við báðar partarnar vanta.

Tey útlendsku tíðindini eru eisini liðug. Veðrið er skrivað. Og lýsingarnar verða lisnar upp beinleiðis, út frá tí sum lýsarin hevur sent inn.

Enn er klokkan ikki meiri enn 10:52. Avtalan millum partarnar skal undirskrivast kl. 11, so hann fær sær ein kaffimunn aftrat.

Tíðindini verða printað út. Hann skrivar framvegis á telduna - hesa ferð nakrar spurningar til Bárð og Gunnleiv. Her ræður um at nýta hvørja løtu fult út.

Kl. er 11:02, og hann klárur at fara í studio 4.

Ein íslendsk fløga liggur klár við pultin í studio. Onkur hevur kanska hildið, at lagið hjá Vestmonnum "Eg siti so eina" hevur verið heldur ofta at hoyrt hesa seinastu vikuna.

- Enn havi eg ikki avgjørt, hvønn tónleik eg fari at spæla eftir tíðindini í dag, sigur stjórin.

### Enn í venjing

Tað var seinnapartin hósdagin í farnu viku at tað slitnaði í samráðingunum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

So skjótt sum boðað varð frá hesum við lýsing í útvarpinum, gjørdist stjórin álitið hjá lurtarunum hjá útvarpinum í Kringvarpi Føroya.

Hann boðaði frá, at tvær tíðindasendingar fóru at verða hvønn dagin – á middegi og aftur um kvøldið. Og hesar hevur hann so staðið einsamallur fyri.

- Eg eri ikki heilt farin út av trening at gera tíðindi. So galið er tað ikki!

Hetta er ikki fyrstu ferð at Jógvan er í hesi støðuni. Tað longsta hann soleiðis hevur verið til arbeiðis sum einsamalt tíðindafólk í útvarpinum var í samfullar 23 dagar.

- Ta ferðina var tað eitt sindur strævið, viðgongur stjórin.

Hesa ferð er líkt til at hann bert verður til arbeiðis í eina viku, nú líkt er til at partarnir hava gjørt eina semju.

### Einmansstudio

Ein av útvarpsmonnunum kemur inn á skrivstovuna. Dia Midjord.

Hann hevur eisini fylgt gongdini, og er til reiðar at fara aftur til arbeiðis, tá boðini koma um tað.

- Ja, tit møta so kl. 13, sigur stjórin.

- OK, sigur Dia. Eg fari so bara at ringja runt fyri at siga tað við hini.

So er hann farin.

Jógvan fer oman trappurnar og inn í lítla studio 4. Her stendur øll útgerðin fullkomuliga klár.

- Vit hava altíð eina tilbúgving til slíkar støður sum hesa, sigur stjórin.

Studio 4 er eitt eittmansstudio. Tað er einfalt at brúka, og ivast nakar í onkrum, so liggur ein leiðbeining um, hvussu ein ger – líka frá tí at tendra sendinetið og til at gera eina tíðindasending.

- Lat líka hurðina aftur!

Hann fer yvir til pultin, og tekur headsettið uppá. Tekur hornið av og snarar síðani telefonnummarið hjá fíggjarmálaráðharranum. Hann bíðar eina løtu, men fær ikki fatur.

- Har er bundið, sigur hann.

Hann fer út aftur í gongina, og kemur løtu seinni inn aftur við einum glasi við vatni. Hann roynir aftur.

Hesaferð fær hann fatur á Bárði.

### Lítið studio

- Tú, Bárður. Eg ætlaði at fáa eina viðmerking frá tær ... Nå, sáttmálin er ikki undirskrivaður enn?! So, ringi eg aftur um eina løtu!

Klokkan er 11:11 og enn er góð tíð til tíðindini skulu í luftina.

- Tað hevði helst verið best um eg fekk teir báðar – Bárð og Gunnleiv – inn í studio, men tað er ov lítið til tað.

- Eg tosi tí fyrst við Bárður. Og síðani havi eg eina avtalu við Gunnleiv. So fái eg báðar partar við í sendingina, sigur útvarpsstjórin.

Hann hevur havt eina strævna viku. Men um minni enn tveir tímar koma allir starvsfelagarnir aftur til arbeiðis.

So kann hann aftur fara í holt við tær uppgávurnar, sum hoyra einum stjóra til.

Nú er hann ikki sooo eina longur!



*Sendinetið skal aktiverast undan hvørji tíðindasending. Tað er eisini ein partur av arbeiðinum hjá einum kringvarpsstjóra*

# Evnisdagur um Jerúsalem – Guds bý

**Leygardagin 22. oktober skipar Ísraelsmissiónin fyri evnisdegi í missiónshúsinum á Toftum við evninum 'Jerúsalem - Guds býur'. Jan Mortensen, prestur í eini messianskari kirkju í Tel Aviv í Ísrael, kemur at tala**



*Jan Mortensen, prestur í Immanuelskirkjuni í Tel Aviv, talar á evnisdegnum um Jerúsalem*

Evnisdagurin á Toftum byrjar kl. 9:00 við einum drekkamunni og rundstykkjum og endar kl. 12. Á skránni eru tveir tímar við heitinum 'Jerúsalem í Skriftini - Guds býur'. Eisini verður 'Nýtt úr Ísrael'.

Talari á evnisdegnum verður Jan Mortensen. Jan er prestur í Immanuelskirkjuni í Tel Aviv. Hetta er eitt kirkjulið av messianskum (kristnum) jødum. Jan er úr Danmark, og hevur seks tey síðstu árini búð og arbeitt í Ísrael, fyrst í Jerúsalem, har hann var prestur fyri danska kirkjuliðið, og síðani í Tel Aviv, har hann er prestur í Immanuelskirkjuni. Í kirkjuni er bæði eitt ensktalandi- og eitt hebraisktalandi kirkjulið. Eini fimm - seks onnur kirkjulið brúka eisini hølini í Immanuelskirkjuni og Meinigheitshúsinum, ið eru knýtt at kirkjuni, til teirra tiltøk.

### Vitjar um landið

Umframt evnisdagin, kemur Jan eisini at prædika á gudstænastu og tala á møtum, og ungdómsmøtum um landið.

Hóskvøldið 20. oktober verður hann í missiónshúsinum í Sørvági, fríggjakvøldið 21. í kirkjukjallaranum í Gøtu, leygardagin 22. á felagsungdómsmøti á Strondum og sunnudagin 23. prædikar hann í Vesturkirkjuni, og um kvøldið talar hann á møtinum í Emmaus í Klaksvík og á ungdómsmøtimum í KFUM & K í Klaksvík.

Øll tiltøkini eru almenn.


ÁRSINS BÓK

Seinna bókin um vanlukkur í Norðurhøvum kemur út um ein mánað. Hesaferð verður m. a. sagt frá, tá "Sigurfari" bjargaði russiskum sjómonnum í ódnarveðri, tá "Stathav" sakk, og tá "Sjóborgin" gekk burtur. Eisini er drúgv frásøgn frá vanlukkuni við "Jøkulfell" tíðliga í ár.

Bókin kostar 248 krónur íroknað postgjald. Tað ber til at ogna sær hana frá forlagnum við at seta peningin á konto 9865 1028949 í Norðoya Sparikassa.

**FORLAGIÐ GRÁFELLI**
**grafelli@email.fo**






## Brot út heyst-skeiðskrá okkara

**Teldukoyrikort og teldukoyrikort BASIS**
**Teldukoyrikorti er fyri øll, ið vilja læra munadygga teldunýtslu - uttan mun til aldur ella yrki. Teldukoyrikortið er uppbygt av sjey skeiðum. Næmingurin kann fáa teldukoyrikorti eftir at hava staðið royndirnar, ið hoyra til skeiðini.**
**Sum nakað nýtt bjóða vit eisini Teldukoyrikort BASIS. Hetta er eitt prógv, ið næmingurin kann fáa eftir at hava staðið royndirnar, ið hoyra til 4 av skeiðunum, ið eru í tí vanliga teldukoyrikortinum.**



**7. november 2005**
Grundskeið í rokniarki v/MS Excel
4 x kl. 13:30 - 16:30: 07/11 + 14/11 + 21/11 + 28/11

**5. desember 2005**
Grundskeið í samskiftistøkni v/IE og Outlook Express
3 x kl. 13:30 - 16:30: 05/12 + 12/12 + 19/12

**7. desember 2005**
Grundskeið í framløguforritum v/MS PowerPoint
2 x kl. 13:30 - 16:30: 07/12 + 14/12

**9. desember 2005**
Grundskeið í tekstviðgerð v/MS Word
4 x kl. 13:30 - 16:30: 09/01 + 16/01 + 23/01 + 30/01




**Teldurøð til nýbyrjarar**
LÆR AT NÝTA-skeiðrøðin er ætlað øllum nýbyrjarum. Skeiðini eru smíðað við denti á tað ítøkiliga heldur enn tað teoretiska og nógv verður gjørt burturúr at øll "eru við". Eingi krøv til forkunnleika eru - vit byrja frá grundini.

**19. oktober 2005**
Lær at nýta internet
3 x kl. 09:00 - 12:00: 19/10 + 26/10 + 02/11

**25. oktober 2005**
Lær at nýta teldu
3 x kl. 13:30 - 16:30: 25/10 + 01/11 + 08/11

**9. november 2005**
Lær at nýta tekstviðgerð
3 x kl. 09:00 - 12:00: 09/11 + 16/11 + 23/11

**Trivnaður á arbeiðsplássinum**
21. juni í ár skipaðu vit fyri evnisdegi á Hotel Føroyum við heitinum "Trivnaður á arbeiðsplássinum", har dentur var lagdur á nøkur ávís evni. Áhugin fyri hesum evnum vísti seg at vera ógvuliga stórur, og fara vit tí at skipa fyri skeiðum innan hesi evni.

**2. november 2005**
- nýtt Psykiskt arbeiðsumhvørvi
1 x kl. 09:00 - 12:00: 02/11

**2. november 2005**
- nýtt Stress - fyribyrging og viðgerð
1 x kl. 13:00 - 16:00: 02/11

**Meira kunning um skeiðrøðirnar er at finna á heimasíðu okkara (sí www.kvasir.fo).**

**KVASIR nøktar tín skeiðtørv innan telduskeið, grafisk skeið og menning.**

Tel 320 204
**www.kvasir.fo**